Heimaliðið tók alt í evstu løtu

Í torførum umstøðum orsaka av høgættini eydnaðist tað fyri fyrstu ferð nakrantíð EB/Streymi at fáa fult ímóti toftamonnum, sum mistu javnleikin í evstu løtu

EB/STREYMUR-B68
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo

John Heri Dam og B68 noyddust vóru um reppið at fáa eitt stig í útidystinum á Mølini á Eiði, men í síðstu løtu skoraði Sonni L. Petersen sigursmálið til 2-1 fyri heimaliðið

Mynd: Sofus D. Johannesen

Tað er vent upp og niður í fótbóltinum á Eiði og á Toftum. EB/Streymur hevur undanfarnu árini verið millum evnini til niðurflyting, og B68 hevur verið millum heiðursmerkja kandidatarnar. Nú er B68 isolerað á tíggjunda og aftasta plássinum, meðan EB/Streymur tykist vera á veg ímóti uppaftur betri endastøðu enn henni, sum teir rukku í fjør. Tá vórðu teir nummar seks. Í løtuni eru teir millum evnini at vinna heiðursmerki.

Eydnan klistrar seg sjáldan til tann, sum tað gongst illa hjá. Soleiðis plagar tað at verða tikið til, og gongdin í høgættar illveðrinum á Mølini seinnapartin sunnudagin var enn ein áminning um hendaveruleikan.

B68 kom á odda, tá ið seinna umfarið var tíggju minuttir gamalt. Eftir horna og út frá smekkaði miðvallarin Eyðstein Skipanes til, og bólturin smeyg sær millum allar í brotsteiginum og í málið aftanfyri Gunnar á Steig.

Inntil tá hevði tað leikliga verið tætt og gingið báðar vegir. Toftamenn tóktust hava góðan hugburð og stríddust fyri lívinum, og heimaliðið var miðvíst og dúvaði upp á skjót gjøgnumbrot hjá vandamiklu monnunum í fremstu rød.

Einki mál kom undan steðginum. B68 hevði lítla yvirvág fyrra partin av fyrra umfarinum, og Sorin Anghel og Sonni L. Petersen vóru støðugt vandamiklir í hinum endanum. Tá ið tað restaðu fimm minuttir varð bólturin eftir uppspæl í høgru sendur í tværtræið aftanfyri B68 málverjan, Jacek Przybylski, men tað spurdist ikki meiri burturúr, og tað kom væl við hjá spælarunum, tá ið Lassin Isaksen bríkslaði fyri hálvleikssteðgi og harvið høvinum at heita sær eitt sindur og hvíld undan høgættini, sum stóð rættuliga hvøss inn á Møline við avfalli og nógvum runi í sjónum.

Sigursmálið í síðstu løtu

Tá ið B68 hevði lagt seg framum, gjørdist trýstið ímóti B68 verjuni støðugt størri. Tað var neyvan ætlanin hjá toftamonnum, at teir skuldu leggja seg av verja tepru leiðsluna, men heldur var tað heimaliðið, sum flutti fólkið eitt vet longri fram, og sum alt títtari var gestur í B68 brotsteiginum.

EB/Streymur spældi seg til einstakar hálvar og eitt sindur meiri enn so málmøguleikar, men tað var sjálvmál hjáB68 miðskeiðis í 2. hálvleiki, sum var orsøkin til útjavningina. Eftir innlegg úr høgru stríddust Sorin Anghel og B68 miðvallarin Mikkjal Thomassen í luftini, og tað var B68 miðvallarin, sum var so óheppin við høvdinum at stýra bóltinum í sítt egna mál, tá ið hann æglaði at beina honum út til horna.

Síðstu løtuna gekk tað javnt á. Bæði liðini høvdu hug at søkja at, uttan at møguleikarnir, sum spurdust burturúr, vóru serliga vandamiklir. Alt bendi á eitt stig í part, men so var tað, at EB/Streymur í yvirtíðini fekk sigursmálið. Innleggið úr høgru tóktist ikki serliga vandamikið, men fyri at vera heilt vísur, so legði B68 málverjin seg á liðina, tá ið hann skuldi steðga og taka bóltin. Men ólukkutíð fyri hann og illa sperdu liðfelagarnar, so støkk bólturin frá málverjanum. Skjóti og altíð grammi Sonni L. Petersen, sum so at siga hvørja ferð fær fulla spælitíð á Eiði, var framvið, og hann potaði bóltin framvið liggjandi málverjanum og í málið.

Heimamenninir vóru ovurfegnir. Trý stig vóru komin á kontina, og nú eru teir á veg fram ímóti heiðursmerkjaplássi. Gestirnir stóðu sum kánus. Alt hevði bent á, at teir fyri aðru ferð innan tvær vikur skuldu fáa javnleik á útivølli, men nú høvdu teir mist alt, og í avgerandi støðunum høvdu teir hjálpt mótstøðumonnunum rættuliga væl.

FAKTA

EB/Streymur-B68 2-1 (0-0)

0-1: Eyðstein Skipanes 54.
1-1: Sjálvmál 66.
2-1: Sonni L. Petersen 90.

Dómari: Lassin Isaksen

EB/Streymur:
Gunnar á Steig – Carl H.Høgnesen, Fróði Clementsen, Knút Vesturtún, Esmar Eiðisgarð (Gert Hansen, 78.) – Bárður Olsen (Hallur Jacobsen, 72.), Nicu Dogaru (Jákup Martin Joensen, 65.), Marni Djurhuus, Hans Pauli Samuelsen – Sorin Anghel, Sonni L. Petersen

Gult kort: Jákup Martin Joensen

B68:
Jacek Przybylski – Alex Troleis, Oleif Joensen, Kári Sigvardsen, John Heri Dam – Jóhan Petur Poulsen (Herbert í Lon Jacobsen, 73.), Mikkjal Thomassen (Ronnie Svalbard, 86.), Eyðstein Skipanes, Øssur Jacobsen – Øssur Hansen – Kristian Anton Andreassen (Stanislav Stankov, 64.)

Gult kort: Oleif Joensen

Coca Cola-cup 2004

Argja Bóltfelag skipar fyri 6. ferð fyri fótbóltskapping. Kappingin verður fyri yngru deildirnar og verður í døgunum 13. og 14. august

TÍÐINDASKRIV
Argja Bóltfelag

Flest allir ungdómsleikarar í fótbólti liggja stillir í bestu tíð á árinum at leika fótbólt. Tað er stórt spell, tí summarfótbóltur átti at verði tikin í størri álvara.

AB skipar fyri 6. ferð fyri fótbóltskapping á Argjum. Kappingin verður í døgunum 13. og 14. august, ið er ein vika áðrenn fótbólturin byrjar eftir summarfrítíðina.

Kappast verður í hesum deildum, pinkulingar, smápiltar, piltar, smádreingir, dreingir, pinkur, Gentur 10-12 ár, Gentur 12-14 og Gentur 14-17 ár.

Leikt verður á hálvum vølli, tó leika pinkur og pinkulingar á 1/2 vølli. Leiktíðin er 2 umførð á 7 minuttir.

Nr. 1, 2 og 3 fáa heiðursmerkir, umframt at vinnandi liðið í hvørji deild vinnur steyp til ognar.

Tilmeldingarskjøl eru send feløgunum og seinasta freist at tilmelda lið til kappingina er 1. august.

Kappingin hevur verið væl vitja undanfarin ár, og luttøkan er avmarkað. Kunning um kappingina fæst eisini á heimasíðu felagsins www.ab.fo.

Allir halda fram millum teir næstbestu

Allir føroysku spælararnir hjá Fremad Amager vóru á vøllinum leygardagin, men tað var bara Andrew av Fløtum, sum spældi alla tíðina

DANMARK 1. DEILD
Jóannes Hansen

Andrew av Fløtum var einastu føroyski leikarin á Fremad Amager-liðnum, sum fekk fulla spælitíð í seinasta leikumfari í dansku fyrstu deild

Savnsmynd

Tað hevur verið nógv stríð og strev hjá feløgunum í næstbestu dansku fótbóltsdeildini, sum hava føroyingar á liðnum. Og stríðið hevur verið av hvør sínum slagi.

AC Horsens, sum hevur Johan B. Hansen á liðnum, var undan várhálvuni klárt oddalið og harvið á veg ímóti superliguni. Síðani gekk tað minni væl, og tá ið kappingin endaði leygardagin, var tað ikki óvæntað, at AC Horsens endaði á triðja plássinum. Teir fingu 62 stig ella fýra færri enn Randers og fimm færri enn Silkeborg. Hesi bæði jysku feløgini skulu næsta kappingarár royna seg í fremstu deildini.

Leygardagin var Johan B. Hansen í miðverjuni allar 90 minuttirnar, tá ið Horsens á útivølli í Aalborg vann 1-0 á FC Nordjylland. Talan var um rættuliga tepran sigur. Síðstu løtuna hevði heimaliðið fleiri risa stórar møguleikar at javna, men teir misnýttu.

Hjá Horsens var tað ivaleyst líka frægt at enda á triðja plássinum sum at flyta upp. Í Danmark verður mett, at einasta felagið í næstbestu deildini, sum møguliga hevur møguleika at standa seg í bestu deildini, er Silkeborg. Randers verður roknað sum kanónføði í superliguni.

Vejle, sum hevur Christian Høgna Jacobsen, sum hevur verið skaddur seinastu mánaðirnar, á liðnum, hevur alt kappingarárið strevast fyri at sleppa undan niðurflytingini. Mesta partin av árinum hevur tað sæð svart út, men nú síðsta umfarið er spælt, er tað greitt, at Vejle eisini næsta ár fer at vera í næstbestu deildini.

Í síðsta umfarinum vunnu teir 3-1 á heimavølli ímóti FC Aarhus, sum er ein av trimum niðurflytarum. Hinir niðurflytararnir eru B1913 og Brønshøj.

Fremad Amager skal eisini næsta ár spæla í næstbestu deildini, har teir í hesum umfarinum hava verið í eitt ár. Teir endaðu eitt pláss omanfyri Vejle. Leygardagin tapti Fremad Amager 3-1 í Fredericia, eftir at Fremad Amager í steðginum hevði verið frammanfyri 1-0.

Andrew av Fløtum var einasti føroyski spælarin, sum var á vøllinum allar 90 minuttirnar. Jann Ingi Petersen varð skiftur út í 56. minutti, og Hjalgrím Elttør, sum hevði havt ein góðan málmøguleika í 1. hálvleiki, varð skiftur út, tá ið tað restaðu tólv minuttir.

FCK í forsølu

Í morgin fara Todi Jónsson og liðfelagarnir hjá honum í FCK undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið. Ein partur av fyrireikingunum fara at verða í Føroyum. Sum kunnugt skal FCK spæla í Klaksvík ímóti KÍ mánadagin 5. juli ella um knappar tvær vikur. Tann dysturin verður klokkan 18. Mikudagin 7. juli skal FCK spæla á Tórsvølli ímóti HB. Tann dysturin verður klokkan 18.30.

Á heimasíðu síni, todi.fo, sigur Todi, at tað seinni í hesi vikuni fer at bera til at keypa atgongumerki til dystirnar í Føroyum í forsølu. Atgongumerkini fara at verða til keyps á Statoil stoðunum í Klaksvík, í Saltangará og í Gundadali.

Í forsølu verður prísurin 85 krónur fyri børn og 185 krónur fyri vaksin. Við dyrnar verður prísurin eitt hundrað krónur fyri børn og tvey hundrað krónur fyri vaksin.

Í gjár ljóðaði tað, at enn ein av liðfeløgunum hjá Toda fer at skifta felag. Talan er um fyrrverandi liðformannin, Christian Lønstrup. Síðani hann um ársskiftið varð friskur aftur eftir drúgvan knæskaða, hevur tað gingið striltið hjá honum at endurvinna miðvallarplássið. Eitt nú hava fleiri smáskaðar forða honum í rættuliga at koma fyri seg.

Nú ljóðar, at Lønstrup skal leigast út til AB, sum næsta kappingarár skal spæla í næstbestu deildini. Christian Lønstrup er annars sáttmálabundin at FCK í hálvt annað ár aftur.

jh

Máltindurin

John Petersen	B36	6
Heine Fernandez	HB	6
Rógvi Jacobsen	HB	6
Bogi Gregersen	Skála	6
Sorin Anghel	EB/S	5
Jónhard Frederiksberg	Skála	5
Sonni L. Petersen	EB/S	4
Krzystof Popczynski	GÍ	4
Rúni Nolsøe	HB	3
Rúni Elttør	ÍF	3
Atli Danielsen	KÍ	3
Milan Kulic	VB	3

Danska 1. deild

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Silkeborg	30	21	-	4	-	5	70	25	45	67
2 Randers FC	30	21	-	3	-	6	85	43	42	66
3 AC Horsens	30	19	-	5	-	6	50	26	24	62
4 Køge	30	18	-	7	-	5	62	39	23	61
5 Skjold	30	16	-	4	-	10	62	50	12	52
6 Sønderjyske E	30	15	-	6	-	9	72	51	21	51
7 Ølstykke	30	13	-	4	-	13	59	53	6	43
8 Nykøbing	30	13	-	4	-	13	46	51	-5	43
9 FC Nordjylland	30	10	-	9	-	11	34	42	-8	39
10 Fredericia	30	9	-	9	-	12	42	47	-5	36
11 Fremad Amager	30	9	-	7	-	14	42	53	-11	34
12 Vejle	30	8	-	6	-	16	44	59	-15	30
13 B 93	30	7	-	7	-	16	44	50	-6	28
14 Brønshøj	30	6	-	6	-	18	43	77	-34	24
15 FC Aarhus	30	5	-	5	-	20	29	72	-43	20
16 B 1913	30	3	-	8	-	19	27	73	-46	17
6 B1909	30	13	-	5	-	12	55	48	7	44
7 Slagelse	30	11	-	7	-	12	54	47	7	40
8 Brabrand	30	10	-	9	-	11	51	47	4	39
9 Hjørring	30	12	-	3	-	15	46	74	-28	39
10 Glostrup	30	11	-	5	-	14	53	57	-4	38
11 Lyngby	30	9	-	10	-	11	51	62	-11	37
12 Jetsmark	30	9	-	9	-	12	39	59	-20	36
13 Kalundborg	30	8	-	10	-	12	57	64	-7	34
14 Holstebro	30	8	-	7	-	15	48	62	-14	31
15 Skive	30	8	-	4	-	18	49	61	-12	28
16 Hvidovre	30	5	-	10	-	15	32	62	-30	25

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)

Íslendska Landsbankadeildin

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Fylkir	6	4	-	2	-	0	9	3	6	14
2 Keflavík	6	3	-	1	-	2	7	9	-2	10
3 ÍBV	6	2	-	3	-	1	10	6	4	9
4 ÍA	6	2	-	3	-	1	7	5	2	9
5 FH	6	2	-	3	-	1	7	6	1	9
6 KR	6	2	-	2	-	2	6	7	-1	8
7 Grindavík	6	1	-	4	-	1	5	6	-1	7
8 KA	6	2	-	1	-	3	5	6	-1	7
9 Fram	6	1	-	2	-	3	7	8	-1	5
10 Vikingur R	6	0	-	1	-	5	3	10	-7	1

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA), Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen (Fram)

Danska 2. deild

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 HIK	30	18	-	7	-	5	68	43	25	61
2 Dalum	30	16	-	6	-	8	68	43	25	54
3 Næstved	30	15	-	8	-	7	60	34	26	53
4 Kolding FC	30	15	-	7	-	8	54	41	13	52
5 Holbæk	30	14	-	9	-	7	62	42	20	51

1. deild menn

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Skála	7	5	-	2	-	0	18	5	13	17
2 HB	8	5	-	2	-	1	21	9	12	17
3 VB	8	3	-	4	-	1	11	6	5	13
4 B36	8	3	-	3	-	2	17	12	5	12
5 NSÍ	7	3	-	3	-	1	12	10	2	12
6 EB/Streymur	8	3	-	2	-	3	14	11	3	11
7 KÍ	8	1	-	6	-	1	9	10	-1	9
8 GÍ	8	2	-	2	-	4	9	17	-8	8
9 ÍF	8	1	-	1	-	6	12	26	-14	4
10 B68	8	0	-	1	-	7	6	23	-17	1

2. deild menn

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 TB	8	6	-	0	-	2	25	11	14	18
2 AB	8	5	-	2	-	1	15	9	6	17
3 Royn	8	5	-	0	-	3	22	18	4	15
4 FSV	8	4	-	2	-	2	30	16	14	14
5 B71	8	4	-	1	-	3	21	22	-1	13
6 Sumba	8	3	-	2	-	3	12	13	-1	11
7 KÍ	8	2	-	2	-	4	17	21	-4	8
8 B36	8	2	-	2	-	4	10	18	-8	8
9 LÍF	8	1	-	2	-	5	10	23	-13	5
10 VB	8	0	-	3	-	5	7	18	-11	3